# Turistur í ka



*Týsdagin byrjaðu mótmælini ímóti Hosni Mubarak, forseta, og skjótt var luftin í býnum full í táragassi*

**UPPREISTUR** Danski ferðaleiðarin hugsar seg um, áðrenn hon tosar. – På grund af demonstrationer er nationalmuseet desværre lige blevet lukket. Egyptar vilja hava forsetan frá, og komandi dagarnar flýtur blóð í gøtunum, meðan tað er ólógligt at vera úti um náttina

Eirikur í Jákupsstovu

Tað er týsdagur 25. januar og klokkan er júst farin av tvey seinnapartin. Vit hava sum góðir turistar verið og hugt at pyramidunum og sfinksinum. Eg standi og bindi lissurnar í tungu, heitu luftini í næstmest dálkaða býnum í heiminum, eftir at hava verið inni í Amr Ibn el-Aas moskuni í Kairo, og vit skulu um eina lítla løtu hyggja at mumium á tjóðarsavninum.

Trygdarvørðurin við illa goymdu maskinbyrsuni undir klædningsjakkanum, sum er við okkum á útferðini til Kairo, stendur og tosar álvarsliga við ein politist uttan fyri moskuna.

Tá vit eru komin inn í bussin aftur fáa vit at vita, hvat politisturin og trygdarvørðurin tosaðu um.

– Der er demonstrationer ved nationalmuseet, men de er fredelige og de vil i værste fald påvirke trafikken lidt, sigur ferðaleiðarin.

Tað gongur ein lítil løta, áðrenn hon aftur tekur mikrofonina í bussinum, og hesaferð hugsar hon seg um, áðrenn hon tosar.

– På grund af demonstrationer er nationalmuseet desværre lige blevet lukket, så vi må finde et alternativt sted at besøge, sigur hon stutt.

Ein miðaldrandi kvinna kemur skjótt við hugskotinum, at vit skulu vitja forsetaborgina í staðin.

– Do you want to get shot or something?

Orðini gleppa erliga úr munninum á egyptiska hjálparanum hjá ferðaleiðaranum, og hann fær beinanvegin greið boð frá ferðaleiðaranum at tiga og seta seg niður.

Vit fáa ikki meira at vita um mótmælini, men tá vit tendra sjónvarpið á hotellinum fáa vit at vita, hvat er farið fram, og egyptiski hjálparin hevði meira rætt enn nakar í bussinum hevði væntað.

Tvey fólk eru deyð í samanbrestum millum løgregluna og mótmælisfólkini, og yvir 100 eru handtikin tætt við tjóðarsavnið, vit skuldu vitja.

## Forsetin skal frá

Boðskapurin er greiður hjá mótmælisfólkunum í landinum, har bashish, sum merkir drykkjupengar ella mutur, er ein natúrligur partur av tímalønini hjá einum stórum parti av fólkinum.

– Forsetin skal frá! Í næstan 30 ár hevur hann bara latið staðið til, meðan koruptión, bureokrati og fátækradømi bara eru vaksin, orðar stjórin á einum blaði í Kairo, sum luttekur í mótmælisgonguni, seg um kenslurnar mótmælisfólkini hava.

40 prosent av fólkinum í landinum hevur minni enn 11 krónur um dagin at liva fyri, umleið tíggjundi hvør hevur onki arbeiði og tað eru tey ríkastu og valdmiklastu, sum Hosni Mubarak, egyptiskur forseti, hevur arbeitt nógv fyri seinastu 28 árini fyri at halda fast við sítt vald, samstundis sum matvøruprísirnir eru vaksnir næstan 20 prosent seinasta árið.

Tað er hetta mótmælisfólkini vilja broyta, og fram til leygardagin eru ógvusligir samanbrestir millum løgregluna og mótmælisfólk í tíggjutúsundatali.

## Nógv vald

Ófriðurin í Kairo er nógvur, og í løtuni er undantaksstøða, men spyrt tú ein vanligan egyptara 400 kilometrar burtur frá høvuðsstaðnum, so grínur hann bara eftir spurninginum, um Mubarak fer frá. Og tað er kanska ikki so undarligt, at hann ikki veruliga roknar við at forsetin fer.

Seinastu 28 árini hevur Hosni Mubarak sitið við øllum valdi í